FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá stýrisfundi 22. september 2015**

---

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Týsdagur 22. september 2015, klokkan 9.00 |
| Fundarstaður: | Náttúruvísindadeildin, Nóatún 3 |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, Tove Bull, Juanna Joensen, Gestur Hovgaard, Sára Joensen, stýrislimir, Bergur Dalsgaard, umboð fyri Ráð teirra lesandi, Sigurð í Jákupsstovu, rektari og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri<br><br>Rektarin og fyrisitingarstjórin fóru av fundinum kl. 13. |

---

Herálvur bjóðaði vælkomin.

Herálvur boðaði frá, at stýrisfundurin er skipaður í tveir partar. Leiðslan luttekur á fyrra parturin, men ikki á tí seinna.

Skráin fyri stýrisfundin varð góðkend.

Fundarfrágreiðingin frá seinasta fundi varð góðkend.

**Skrá:**

1. **Fíggjarstøðan 2015**

Rektarin legði fíggjarstøðuna fram.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Fíggjarstøðan 21. september 2015:

**Fíggjarár 2015**
**Fróðskaparsetur Føroya**
**Rakstur**

| | Salda 08-2015 | Játtan 2015 | Avlop 08-2015 | Salda 09-2015 | Salda 08-2014 | Játtan 2014 | Avlop 08-2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 Lønir v.m. | 43.792.964 | 68.636.000 | 36% | 43.982.001 | 40.647.599 | 65.224.000 | 38% |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 6.749.687 | 8.000.000 | 16% | 7.492.491 | 6.467.446 | 8.000.000 | 19% |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | 327.959 | 1.100.000 | 70% | 340.817 | 804.357 | 1.100.000 | 27% |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.965.776 | 2.528.000 | 22% | 2.258.456 | 1.834.806 | 2.528.000 | 27% |
| 21 Søla av vørum og tænastum | -197.885 | -1.500.000 | -87% | -226.349 | -99.453 | -1.500.000 | -93% |
| 32 Útvegan av løgu o.ø. | 0 | 0 | 0% | 0 | 0 | 0 | 0% |
| 52 Tilskot til einstaklingar | 77.152 | 100.000 | 23% | 77.152 | 197.062 | 100.000 | -97% |
| 54 Stuðul til annað virksemi | 50.000 | 0 | 0% | 50.000 | 0 | 0 | 0% |
| 65 Flytingarinntøkur úr útlandinum | -68.169 | 0 | 0% | -68.169 | 0 | 0 | 0% |
| 71 Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 10.260 | 0 | 0% | 10.260 | 28.432 | 0 | 0% |
| 75 Keyps-mvg | 0 | 0 | 0% | 152.306 | 0 | 0 | 0% |
| 76 Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -1.616.668 | -2.200.000 | -27% | -1.800.001 | -1.466.668 | -2.200.000 | -33% |
| 77 Flyting frá kommununum til landið | -884.628 | -1.500.000 | -41% | -884.628 | -934.466 | -1.500.000 | -38% |
| 78 Flyting frá landinum (komm) | 0 | 0 | 0% | 0 | 11 | 0 | 0% |
| **Tilsamans** | **50.206.447** | **75.164.000** | **33%** | **51.384.336** | **47.479.125** | **71.752.000** | 34% |

Fíggjarstøðan vísir greitt, at inntøkurnar (standardkonta 21) ikki standa mát við fíggjarætlanina. Fíggjarleiðarin kannar í løtuni, hvørjar inntøkur(overhead) kunnu dragast inn í vanliga raksturin frá verkætlanunum.

Framrokningin hjá fíggjarleiðaranum vísir eitt hall á 1,073 mió.kr.




| | Jan R | Feb R | Mars R | Apríl R | Mai R | Juni R | Juli R | August R | Sept Framsk | Okt Framsk | Nov Framsk | Des Framsk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 6.264 | 12.527 | 18.791 | 25.055 | 31.318 | 37.582 | 43.846 | 50.109 | 56.373 | 62.637 | 68.900 | 75.164 |
| Lønir | 4.770 | 9.855 | 15.238 | 21.302 | 27.068 | 32.697 | 38.751 | 43.793 | 49.340 | 54.956 | 60.613 | 66.269 |
| Keyp av vørum og tænastum | 507 | 1.439 | 2.217 | 3.399 | 4.361 | 5.651 | 6.314 | 6.750 | 7.950 | 8.850 | 9.750 | 10.650 |
| Keyp av útbúnaði | 113 | 131 | 180 | 239 | 261 | 272 | 329 | 329 | 370 | 411 | 452 | 494 |
| Leiga | 264 | 504 | 756 | 1.010 | 1.250 | 1.512 | 1.756 | 1.966 | 2.210 | 2.454 | 2.698 | 2.942 |
| Inntøkur | 182 | -147 | -842 | -1.245 | -1.651 | -1.963 | -2.579 | -2.767 | -3.142 | -3.517 | -3.891 | -4.266 |
| Avlop/hall | 428 | 745 | 1.242 | 278 | -53 | -669 | -812 | -99 | -495 | -661 | -867 | -1.073 |

Rektarin hevur givið boð til dekanar og leiðslu, um at ansa sera væl eftir ikki at átaka Setrinum nýggjar útreiðslur, ella útreiðslur, sum ikki eru strangt neyðugar. Boðini standa við inntil leiðslan hevur fingið

1) betri yvirlit yvir inntøkurnar,
2) neyvari meting av útreiðslunum fyri restina av árinum
3) svar upp á eykajáttanarumbøn send MMR.

Fróðskaparsetur Føroya heitti tann 7. apríl á Mentamálaráðið um at veita Setrinum eina eykajáttan á 1,8 mió. kr., grundað á, at játtanin til Fróðskaparsetrið hevur verið ov lág seinastu árini. Mentamálaráðið og Løgtingið gingu partvís umbønini á møti, og fekk Setrið eina eykajáttan á 900 t.kr.

Setrið heitti tann 15. september 2015 á Mentamálaráðið um at virka fyri, at Setrið fær eina eykajáttan áljóðandi 1.050 t.kr. fyri seinna hálvár 2015.

Neyvari stýringsamboð skulu mennast, soleiðis at leiðslan fær eitt neyvari yvirlit yvir, hvat ymsu aktivitetirnir kosta. Viðmerkt varð, at tað er umráðandi við einum føstum býtislykli millum lønir og rakstur, t.e. at t.d. 20% skulu setast av til keyp av vørum og tænastum. Seinnu árini eru fleiri nýggj størv sett, hetta setir trýst á játtanina til keyp av vørum og tænastum.
Mentamálaráðið skal kunnast um, at ein økt játtan ikki bert skal fevna um nýggjar útbúgvingar og nýggjar starvsetanir, men eisini til at menna og bøta um verandi virksemi.

Stýrið heitti á leiðsluna um at útvega hagtøl fyri, hvat hvør studentur kostar á Setrinum í mun til onnur smærri universitet í norðurlondum. Fíggjarstøðan skal viðgerast á fyrsta stýrisfundi næsta ár, soleiðis at Setrið hevur eitt betri útgangsstøði til fíggjarætlanina fyri 2017.

## 2. Fíggjarætlan 2016:

Rektarin legði fíggjarætlanina fyri 2016 fram. Fíggjarætlanin er send Mentamálaráðnum í juli mánað.

Ætlan 2016 hjá Fróðskaparsetri Føroya

| | | 2015<br>J | 2016<br>Æ | 2016<br>Æ+raðf. |
|---|---|---|---|---|
| | Nettoútreiðslujáttan | 75.164 | 82.079 | 86.579 |
| | Útreiðslur | 80.364 | 86.779 | 91.279 |
| | Inntøkur | 5.200 | 4.700 | 4.700 |
| **20** | **Fróðskaparsetur Føroya** | | | |
| | Nettoútreiðslur | 75.164 | 82.079 | 86.579 |
| | **Útreiðslur** | **80.364** | **85.579** | **91.279** |
| 11 | Lønir v.m. | 68.636 | 72.039 | 75.639 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 8.000 | 10.740 | 11.640 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 1.100 | 1.000 | 1.000 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.528 | 2.900 | 2.900 |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | 100 | 100 | 100 |
| | **Inntøkur** | **5.200** | **4.700** | **4.700** |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | 1.500 | 1.000 | 1.000 |
| 76 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2.200 | 2.200 | 2.200 |
| 77 | Flyting frá kommunum til landið | 1.500 | 1.500 | 1.500 |

Í næstum verður heitt á landsstýriskvinnuna í mentamálum og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, um at fáa ein fund í lag við umboð fyri Setrið.

Viðmerkt varð, at stýrið í størri mun eigur at tosa um fakliga dygd og innihald, heldur enn einsíðugt at fokusera upp á útbúgvingar.

## 3. Kunning/framløgur um:

### a. Masterlæru í søgu- og samfelagsvísindum – Gestur Hovgaard

Í ár varð fyri fyrstu ferð tikið inn til masterlestur innan søgu, politikk og umsiting, og sosialvísindi og samfelagsplanlegging.
Talan er um ein "alternativan" máta at skipa master-nám uppá, har støðið verður tikið í tí einkulta lesandi, eini: "master-ætlan" heldur enn "útbúgving".
Læringin er bygd upp sum "interaktiv praksislæring" við almennum og individuellum lærumálum.
Tað er neyðugt at skapa læringsumhvørvi uppá tvørs av fakunum til tess at skapa ein "kritiskan massa".

Studenturin skal tillagast tí smala arbeiðsmarknaði eitt lítið oyggjasamfelag hevur, har fokus er á at skapa kompetansur, har hvør einstakur ikki "líkist' hinum.
Útbúgvingin er bygd upp soleiðis:

- 1. Lestrarhálva:
  - Teoretiskt og metodisk grundsemestur
  - Kombi av fak-spesifikkum og felagsaktivitetum
  - Skeið í metodologi, fakskeið (3 linjur), verkætlanir (15 ECTS).
- 2. Lestrarhálva:
  - Uttanlandsuppihald við fokus á serøki (søga, politikk og umsiting, ella sosialvísindi og samfelagsplanlegging)
- 3. Lestrarhálva:
  - Phronetikum – metodulæra og "kontaktin við arbeiðsmarknaðin".
  - Annars sami leistur sum í 1. semestri
- 4. Lestrarhálva:
  - serritgerð

Gestur Hovgaard, Hans Andrias Sølvará, Lív Patursson, Elisabeth Olsen og Anna Olsen eru knýtt at útbúgvingini. Í skrivandi stund eru 16 studentar meldaðir til masterlæruna (3 menn og 13 kvinnur), av teimum taka 2 politikk og umsiting, 5 søgu og 9 sosialvísindi og samfelagsplanlegging.
Metoduskeiðið er liðugt og nú verður farið undir serøkini.
Talan er um eina fyribils útbúgving, men ynskiligt er, at talan verður um eina permanenta útbúgving, men hetta krevur, at granskingin verður styrkt munandi.

Tað ber møguliga til at sameina ávísir partar av Joint Nordic Master útbúgvingini við masterlæruna í søgu- og samfelagsvísindum.

**b. Masterútbúgvingin Joint Nordic Master in West Nordic Studies, Governance and Sustainable Management - Jón Kragesteen og Annelien Ramakers løgdu fram**

Saman við universitetunum Ilisimatusarfik í Grønlandi, Háskólan á Akureyri, Háskúla Íslands í Reykjavík og Universitetet i Nordland á vesturstrond Noregs, bjóðar Setrið eina nýggja altjóða og tvørfakliga masterútbúgving í útnorðurnámi, almennari fyriskipan og burðardyggari leiðslu.
Nýggja masterútbúgvingin gevur lesandi møguleikar at ávirka menningina í Grønlandi, Íslandi,

Føroyum og Vesturnoregi og gevur lesandi góðar møguleikar at flyta seg millum ymisku økini í útnorðri.

Fyrsta skeiðið var eitt innleiðsluskeið á Akureyri. Kunnað varð um, at skeiðið var krevjandi, tí talan var um 10 dagar við fyrilestrum frá kl. 8-16.
Samanumtikið var skeiðið sera áhugavert, men er møguliga ov rúgvismikið, og eigur tí møguliga at verða longt til tvær vikur. 25 studentar vóru til innleiðsluskeiðið. Tilsamans 9 lesandi hava teknað seg til at lesa hesa útbúgvingina á Setrinum, men orsakað m.a. av trupulleikum við innferðarloyvi (visa), verður talan um 6 ella 7 lesandi á útbúgvingini.

### c. Lestrarskrivstovan – Elin Brimheim Heinesen

Elin varð sett sum lestrarskrivstovuleiðari 1. apríl 2015.
Saman við fyrisitingini og deildunum annars á Setrinum hevur lestrarskrivstovan ábyrgd av at virka fyri, at Setrið er so vælvirkandi sum gjørligt í øllum sínum viðurskiftum sum útbúgvingarstovnur.
Yvirskipaða endamálið við vegleiðaratænastuni er at fáa øll tey lesandi til at kenna seg so vælkomin á Setrinum sum gjørligt, og at fyrireika og førleikamenna tey best møguligt til at lesa á Setrinum, soleiðis at so nógv sum gjørligt fullføra sína akademisku útbúgving.
Meginreglan fyri lestrarvegleiðingina á Fróðskaparsetri Føroya er at virka sum hollur stuðul fyri komandi, verandi og farandi lesandi á Setrinum, sum hava tørv á vegleiðing og kunning t.d. um skeiðsútboð, upptøkukrøv, lestrarætlanir, verkstovur og førleikamennandi skeið t.d. um akademiskt arbeiði, lestrarførleikar og stuðul til tey, sum ynskja persónliga vegleiðing bæði viðvíkjandi spurningum viðkomandi fyri teirra lestur ella viðvíkjandi spurningum av meira privatum slag, sum hava árin á teirra lestur.
Saman við øðrum fyrisitingarligum eindum er ætlanin, at lestrarskrivstovan skal taka sær av fyrisitingarligum uppgávum – so sum:
Taka sær av innleiðslu, upptøku/innskriving av lesandi, góðskrivingum, skiftislestri, farloyvi frá útbúgvingum, hølisumsiting, próvtøkufyriskipan, lestrarloki, útmeldingum og annað beinleiðis viðkomandi fyri tey lesandi.

**Vegleiðaratoymið**

Lestrar- og yrkisvegleiðing er ein lutfalsliga nýggj stuðulstænasta á Setrinum, ið er undir uppbygging.
Eitt vegleiðaratoymi varð sett á stovn í 2012, sum hevur sum fremsta mál sítt at samskipa, menna og veita eina javnbjóðis lestrarvegleiðaratænastu á øllum deildum. Arbeitt verður við, at

lestrarvegleiðing, ið er til frama fyri menning og trivnað teirra lesandi, fær hægri raðfesting í komandi árum.
Málið er at menna, samskipa og veita øllum lesandi eina professionella stuðulstænastu. Hetta málið er ikki rokkið enn, tí allar fimm deildir kunnu í løtuni ikki veita eina javnbjóðis tænastu.

4. **Kunning og umrøða**
   a. **Starvssetanir**

Durita Gunvør Joensen (sfd – kliniskur vegleiðari)
Marin Strøm (sfd -10% fram til ársenda)
Jónrit Halling (nvd – mýlalívfrøði)
Lív Patursson, Elisabeth Skarðhamar Olsen, Anna Paulina Leo Olsen (Masterlæra – ssd 3 verkætlanarsett til januar 2016)
Benadikt Joensen (nvd – námslektari)
Turið Petursdóttir (nád – námslektari í ítrótti)
Terji Mikkelsen (nád – húsavørður)
Lydia Didriksen (nád – undirvísari í føroyskum)
Tóta Árnadóttir (fmd – adjunktur, skaldskapur av mannamunni)
Ávegis:
Vísindastarv í løgfrøði
Búskaparfrøðingar
Skrivari til lestrarskrivstovu

   b. **Sáttmálaloysi og arbeiðssteðg í sambandi við løn til starvslæruvegleiðarar fyri námsfrøðilesandi**

Pedagogfelagið hevur noktað limum sínum at taka í móti lesandi frá Setrinum, sum skulu í starvslæru, og blokadan hevur rakt núverandi 2. árs námsfrøðilesandi serliga hart. Støðan er sera óheppin og akutt, og arbeitt hevur verið við at finna eina loysn á málinum.
Setrið hevur millum annað havt fund við Pedagogfelagið, Mentamálaráðið og umboð fyri Lønardeildina, men tað er trupult á fáa eyga á einari loysn á málinum. Lønardeildin fer at taka málið upp við Pedagogfelagið í komandi sáttmálasamráðingunum, sum vera í oktober 2015.
Málið verður eftir ætlan somuleiðis umrøtt, tá stýrisformaðurin og rektarin fara á fund við landsstýriskvinnuna í mentamálum og fíggjarmálum.

### c. Hølisviðurskifti – Bókbindaragøta/Fríðriks Petersens gøta

Sáttmálin í Bókbindaragøtu gongur út 1. november 2015, tá Vodafone flytur inn.
Hølini í Fríðriks Petersens gøtu verða í løtuni málað, og ætlanin er at flyta skrivstovuútgerð, møblar og annað úr Bókbindaragøtu um miðjan oktober.
Lesandi fáa atgongd til niðastu hædd og miðhæddina, meðan ovasta hædd verður sett av til starvsfólk á Setrinum. Somuleiðis verður arbeitt við at gera eitt opið bókasavn í Fríðriks Petersens gøtu.

Viðmerkt varð, at tað er eitt sindur keðiligt at skilja tey lesandi frá restini av virkseminum á deildini og at parkeringsviðurskiftini ikki eru optimal.

### d. Upptøka 2015

Tilsamans 389 umsóknir.

260 fingu bjóðað lestrarpláss. 129 fingu avslag ella at vita, at tey stóðu á bíðilista.

Lýst varð við leysum plássum í føroyskum, orkuverkfrøði og politikki og umsiting.

Býtið millum útbúgvingarnar gjørdist soleiðis: við **feitum** = bjóða pláss, ( )=byrjað

**Bachelor**
Føroyskt **22** (23)
Føroyskt, hjánám **2** (5)
Orkuverkfrøði **20** (18)
Lærara **36** (39)
Námsfrøði **35** (37)
Sjúkraøktarfrøði **23** (23)
Sosialvísindi og samfelagsplanlegging **34** (25)
Politikkur og umsiting **13** (15)
Søga **24** (20)

**Master**
Master í løgfrøði **24** (25)
Master í føroyskum **1** (2)
Masterlæra í søgu- og samfelagsvísindum **17** (14)
West Nordic Studies, Governance and Sustainable Management **9** (6)

252 byrjaðu lestur í 2015: 205 bachelorlesandi og 47 masterlesandi

Søgulig gongd – umsóknir og upptøka

| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| Umsóknir | 273 | 350 | 378 | 366 | 389 |
| Upptikin | 157 | 213 | 274 | 250 | 260 |

Viðmerkt varð, at talið á lesandi sum gevast eisini skal síggjast í yvirlitinum, tí við hesum ber til at síggja vøksturin.

**e. Menningarsáttmáli/avrikssáttmáli við Mentamálaráðið**

Uppskotið er munandi broytt, men arbeiðið hevur ligið stilt seinastu mánaðirnar.

**f. Samstarv - Tórshavnar kommuna**

Eitt uppskot til samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og Fróðskaparsetrið er orðað.

Niðurstøðan hjá stýrinum er, at leiðslan arbeiðir víðari við málinum, men at Mentamálaráðið verður tikið við í arbeiðið.
SiJ fer at seta seg í samband við Sigurð Vang fyri at gera eina ætlan fyri, hvussu víðari verður farið fram.

**g. Sjúkrakassagrunnurin – Høvuðsøki 3**

Tá sjúkrakassagrunnurin varð niðurlagdur, varð ein partur av peninginum settur av til gransking innan trý høvuðsøki. Eitt høvuðsøki er heilsugransking, innan hetta økið eru 7 mió.kr. settar av.
Semja er gjørd við Granskingarráðið um:
Setan av
5 ára vísindastarv - masterútbúgving (øki 3.1)
½ ph.d. starv (øki 3.2)
3 ára vísindastarv - gransking (øki 3.3)

Arbeitt verður nú við at gera eitt upprit/ætlan millum stovnarnar, hvussu ein depil fyri heilsugransking skal skipast.

**Ymiskt:**

Fyrisitingin hevur í samráð við Ráð teirra lesandi gjørt eina vegleiðing fyri, hvussu valið av lesandi í stýrið skal skipast.
Uppskotið verður sent stýrinum til góðkenningar millum funda. Tá stýrið hevur góðkent vegleiðingina, verður skipað fyri valinum skjótast gjørligt.

Skjøl:

i. Frágreiðing frá fíggjarleiðara
ii. Umbøn um eykajáttan september 2015
iii. Játtanaruppskot 2016

Eftir vanliga stýrisfundin hevði stýrið eisini ein fund, har umboð fyri leiðsluna ikki vóru til staðar.

Á skránni vóru tvey mál:

a) Leinging av sáttmálanum við Sigurð í Jákupsstovu, rektara
b) Uppskot um at seta bólk at viðgera framtíðar bygnað v.m.

*Viðvíkjandi a) Leinging av sáttmálanum við Sigurð í Jákupsstovu, rektara*
Verandi sáttmáli við Sigurð í Jákupsstovu, rektara, gongur út tann 31. august 2016.

Stýrisformaðurin hevur samskift við Mentamálaráðið um møguliga leinging av sáttmálanum og er tað í hesum sambandi vorðið greitt, at stýrið, uttan at starvið verður lýst leyst, kann leingja sáttmálan við 3 árum.

Stýrisformaðurin mælti til, at verandi sáttmáli verður longdur, soleiðis at hann ístaðin fyri at fara úr gildi 31. august 2016 fer úr gildi 31. august 2019.

Viðgerðin av málinum er í trúnaði, men ein meiriluti í stýrinum tók undir við tilmælinum.

*Viðvíkjandi b) Uppskot um at seta bólk at viðgera framtíðar bygnað v.m.*
Gestur Hovgaard og Sára Joensen høvdu lagt fram uppskot um at seta ein bólk at viðgera framtíðar bygnað v.m.

Viðgerðin av málinum er í trúnaði, men samtykt varð, at stýrið og rektarin á komandi fundi fara at umrøða bygnaðin og fyrisitingarlig viðurskifti, fyri at gera status yvir, hvussu langt á leið íverksetingin av bygnaðinum er komin; meta um royndirnar við bygnaðinum higartil; meta um hvørjar fyrisitingarligar skipanir skulu raðfestast frameftir v.m.